


Effo sóknast eftir einum dugnaligum KT-leiðara við drúgvum royndum. Sum KT-leiðari kemur tú at standa á odda fyri øllum KT-økinum hjá Effo-samtakinum. Tú fært evstu rakstrarligu ábyrgd av okkara KT-skipanum, og tú verður partur av krevjandi verkætlanum, sum standa fyri framman.

**Arbeiði umfatar m.a. at:**
Sum KT-leiðari hevur tú fjølbroyttan dag og verður við til at:

- Menna KT økið, so arbeiðsgongdir og skipanir á best gjørligan hátt stuðla dagliga arbeiðnum hjá starvsfólki okkara
- Verða partur av KT-verkætlanum
- Menna, reka og viðlíkahalda KT-skipanir
- Samskipa raksturin av KT-kervinum
- Syrgja fyri, at KT kervið altíð er væl tryggjað

**Deildin**
Tú kemur at leiða KT-deildina á høvuðsskrivstovuni á Óðinshædd í Tórshavn, sum er partur av fíggjardeildini hjá Pf. Effo. Deildin hevur í løtuni ein KT-umsitara, sum tú fært starvsfólkaábyrgd fyri. Tú verður partur av leiðslutoyminum á fíggjardeildini.

**Tínir førleikar**
Tú dugir av øllum at leiða eitt arbeiði, hevur álit millum fólk, virðir tey og fært tey við tær. Tú hevur ein eldhuga fyri krevjandi avbjóðingum, snávar ikki í skeivari løtu og missir ikki málið úr eygsjón. Tær dámar eisini væl at fara undir nýggjar og nýmótans mannagongdir og hevur treiskni og dugnaskap til at fullføra tær.

Tú hevur KT-útbúgving og/ella arbeiðsroyndir til at greiða yrkisliga partin av arbeiðinum. Hægri útbúgving er ein fyrimunur. Orðið er ein av tínum styrkjum, bæði skrivliga og munnliga, og enskt dugir tú. Kunnleiki til Navision Attain / Financials er ein fyrimunur.

**Vit bjóða tær**
Vit kunnu bjóða tær eitt sera spennandi og fjøltáttað starv, í einum nýggjum og framkomnum umhvørvi, har KT-økið verður raðfest sera frammarlaga. Starvið gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari og yrkisligari menning. Tær stendur eisini í boði at vera við á skeiðum innanlands sum uttanlands. Vit bjóða kappingarføra løn, sum verður ásett eftir royndum og útbúgving. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

Fleiri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við Sverra Kallsberg, fíggjarleiðara, tlf. 34 35 00.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 12. februar 2010**. Umsóknin skal sendast til:

**Pf. Effo**
**Postboks 3098**
**110 Tórshavn**
**Frámerki: "KT-leiðari"**

ella sum teldupostur til **ska@effo.fo**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Stutt um Effo-samtakið**
Effo veitur orku til føroysk húsarhald, virkir og stovnar umframt til føroysk og útlendsk skip í Føroyum. Felagið eigur stóra terminalin í Fuglafirði, Effo Bunkers, har skip úr øllum heiminum bunkra. Somuleiðis veitir felagið føroyskum og útlendskum skipum oljuúrdráttir í útlendskum havnum og á høvunum. 14 bensinsølustøð eru í okkara kervið. Í dag arbeiða uml. 200 starvsfólk undir Effo-merkinum, har høvuðsskrivstovan er á Óðinshædd í Tórshavn.

effo føroya orkufelag

**Effo** Postboks 3098 110 Tórshavn Tel +298 34 35 00 www.effo.fo

---

Starvslýsing

Heimatænastan í Norðoyggjum

## Visitator til Heimatænastuna Vágar/Norðurstreymoy

Søkt verður eftir einum starvsfólki at arbeiða sum visitator og demenssamskipari í Heimatænastuni í øki 2.

Arbeiðið umfatar visitering av øllum tænastutilboðum innan Heimatænastuna í økinum og at samskipa og menna tænastunar til borgarar við demens og teirra avvarðandi.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara, á tlf. 333249/ 762201.

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvum, og møguligum viðmælum vera at senda til :

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
Økisskrivstovan Hornaveg 12
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 8. februar 2010 kl. 15.00.**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

## Ert tú góður við tíni húsdjór?

So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið





**SPECIAL (20 kg)**

Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Serlig oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum gevur ein blankan og skínandi pels og syrgir fyri at pelsurin ikki gerst turrur. Er tískil eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SPECIAL er eisini sera gott fóður til eldri hundar.

**Fyri posan...... kr. 450,-**

**SØCLA (20 kg)**

Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Inniheldur serliga oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum, ið gev ein blankan og skínandi pels. Er tískil sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SØCLA er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.

**Fyri posan...... kr. 540,-**

**SKYTTENs KAT (15 kg)**

Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur, ið m.a. stimbrar smakkin. Lága PH-virðið fyribyrgir urinsteini (struvitkrystallum). Inniheldur TAURIN, ið er ein aminosýra, ið hevur týdning fyri nethinnuna, hjartamuskulaturin og immunverjuna.

**Fyri posan...... kr. 390,-**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er hágóðskufóður, ið hevur verið framleitt í Danmark síðan 1970. Fóðurið verður útflutt til nógv lond og fæst nú eisini í Føroyum. Fullfóðurið er framleitt úr fiski og høsnarunga og inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.

**Bíleggjast kann við at senda t-post til kho@olivant.fo ella við at ringja á tel. 22 12 40. Ókeypis útkoyring í Tórshavn**

---



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 288233)**

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo